# Tíðindi úr Hoyvíkar Skúla

mars 2007

## At lesa, hann las, teir lósu, hava lisið





Ólavur ringir lesiløtuna inn



## Gloymd klæði

Harmiligt er, at so nógv gloymd klæði liggja eftir á skúlanum uttan navn ella frámerki.

Gott hevði verið um foreldur høvdu merkt klæðini við floksnummari og/ella tlf-nummari, so vit hava møguleika at lata plaggið inn í røttu stovuna.

Vinarliga
Húsavørðurin





## Nýtt andlit í Hoyvíkar Skúla



Bjørn Due Hansen varð á nýggjárinum settur sum húsavørður í Frítíðarskúlanum og Hoyvíkar skúla. Bjørn er 45 ára gamal og hevur starvast sum sjómaður og sjálvstøðugur vinnurekandi. Hann er giftur við Emi og eigur fýra gentur, sum eru 22, 17 og tvíburðar, 12 ára gamlar.

## Innihald:


| | | |
|---|---|---|
| Birgit skrivar | s. | 3 |
| Vitjan á Fiskirannsóknarstovuni | s. | 4 |
| Bókaklubbin hjá Bókadeildini | s. | 5 |
| Hoyvíkin veksur | s. | 6 |
| Vit fara ein súkklutúr | s. | 8 |
| Átak móti happing | s. | 9 |
| Vitjan av Blindastovninum | s. | 10 |
| Aftur í gamlar dagar | s. | 11 |
| Næmingar og lærarar tekna | s. | 12 |
| Lesiløtan | s. | 13 |
| Grýlur | s. | 14 |
| Føroyski dansurin | s. | 15 |


**Blaðbólkurin:**
Henning, Arnbjørn, Kristbjørg, Ingun og Heini

Blaðið er eisini á heimasíðuni
www.skulin.fo/hoy





*Birgit Arge, stjóri*

Góðu næmingar, lærarar og foreldur.

Fleiri tekin eru um, at skúlaárið er farið at halla. Fyrsti várdagur hevur verið, góðar tríggjar vikur eru til páskafrítíðina, tað er ljóst um morgunin, blómurnar í skúlagarðinum kaga varisliga fram og skúlaárið 2007/2008 verður so smátt lagt til rættis.

Serliga nógv hugsa vit um 1. flokk komandi ár. Vit fáa 91 nýggjar næmingar, sum merkir fýra flokkar. Men rúm er bara fyri trimum. Vit royna tó at fáa pláss fyri øllum og eru í løtuni við at finna eina loysn.

Vit bíða enn eftir avgerðini frá myndugleikunum um, hvørji átøk skulu setast í verk fyri at betra fólkaskúlan. Fleiri góð uppskot eru frammi og vónandi verða tey sett í verk skjótt. Men tað nyttar einki at leggja seg afturá at bíða. Vit mugu eisini gera okkurt sjálv, og tað royna vit.

Beint nú er ymiskt áhugavert í skúlanum.
26. mars fóru vit undir eitt lesiátak. Kemur tú í skúlan klokkan 9.10, so sært tú ein mann við eini klokku ringja lesiløtuna inn. Hurðar fara upp á víðan vegg, og hvør einasti næmingur og lærari lesur. Tað er sera stuttligt at síggja. Ikki eitt kis hoyrist og øll sita kúrr og lesa. Meira er um átakið inni í blaðnum.

Lærararnir eru eisini farnir at útbúgva seg meira. Vit eru øll á telduskeiðum, sum okkara dugnaligi telduvørður Heini skipar fyri.

Í mars hava vit bílagt eitt skeið fyri allar lærararnar. Heitið á skeiðnum er Samstarv millum skúla og heim og samtalur við børn og foreldur. Eisini koma vit inn á eftirmeting. Eitt slíkt skeið gevur heilt vist íblástur til samstarvið við eitt nú foreldraráðið.

Evnið happing hevur verið nógv frammi í seinastuni. Mentamálaráðið skipar fyri umfatandi kanning í mars. Kanningin fevnir um allar 5., 7. og 9. árgangirnar í landinum. Okkara happingarbólkur arbeiðir við at gera eina tilbúgvingarætlan, og tað hevur eydnast okkum at fáa Helle Højby, sum nógv kenna úr sjónvarpinum, har hon hevur verið við í sendingum um happing, at halda fyrilestur við kjaki fyri foreldraumboðum og lærarum tann 14. mars. Hetta gleða vit okkum til.

Vit gleða okkum eisini til, at kirkjan nú skjótt stendur liðug. Umframt at frøast um ein so virðiligan granna, verður tað ein stórur lætti, at økið vestanfyri verður atkomuligt aftur. Foreldur og næmingar hava leingi saknað hesa farleiðina, tað vita vit.

Vónandi fara tit at finna okkurt áhugavert í blaðnum hesaferð.

Við ynski um eitt framhaldandi gott skúlaár.

Birgit Arge

# Vitjan á fiskirannsóknarstovuni

**Fyrst í januar mánaði arbeiddi 6.a í náttúru og tøkni við evninum: <u>Havið/fiskur.</u>**

Í hesum sambandi vitjaðu tey Fiskirannsóknarstovuna, har tey fingu eina framúr frágreiðing um fiskastovnar/veiðihættir/havstreymar/grindahvalin o.m.a.

Starvsfólkini á Fiskirannsóknarstovuni vóru væl fyrireikaði at taka í móti gestunum og umframt góða undirvísing fyri næmingunum sýndu tey eisini blíðskap við at bjóða saft og góðgæti.

Ein sera væleydnaður dagur, sum hesin stovnurin eigur stóra tøkk uppibornað fyri.

Myndirnar eru frá vitjanini:



*Næmingarnir fylgja spentir við, meðan Rógvi kryvur ein tosk.*



*Magin varð eisini kannaður fyri at vita, hvat toskurin etur.*



*Hetta tólið er við í eini verkætlan, sum skal kunna okkum meiri um havið.*



*Nitrurnar kunnu siga okkum, hvussu gamal fiskurin er.*

# Bókaklubbin hjá bókadeildini

**Sum flest øllum kunnugt, so hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags í 20 ár rikið bókaklubba til børn og ung. Tað kostar onki at vera limur, og limirnir fáa sendandi 8 bøkur um árið. Niðanfyri eru nakrar teirra, sum fara at koma í næstum.**




*Kristina Steinsdóttir:*

## Eingil í vesturbýnum

Í einum íbúðarblokki býr ein drongur, sum eitur Askur saman við mammu sínari. Fólk flest halda, at har búgva bara vanlig fólk, men Askur veit betur. Har býr ein varúlvur og Pippi Smokku-leggur og ein veiðimaður og ein silvurfiskur. Jú, og so eisini ein eingil. Bókin um Ask og alt, hann hugsar um, ræðist og upplivir, hevur fingið fleiri virðislønir bæði fyri myndir og tekst.




*Heini Hestoy:*

## Regin og Sára

Bókin um Regin og Sáru kom fyrstu ferð út í 1991, og er nú uppafturprentað, tí nógv framvegis vilja sleppa at lesa bókina. Hon er um Regin, hvørs pápi situr fongslaður í Danmark fyri stuldur. Regin hittir ta djørvu Sáru, sum, hóast hon er blind, ikki er ein, ið fellir í fátt. Saman royna tey at vinna á happing og øðrum trupulleikum, tey hava.




*Lene Kaaberbøl:*

## Skuggaportrið

Munnu ikki nógv kenna skamm-bøkurnar? Lene Kaabersbøl var í Havn og vitjaði í september. Nógv børn vóru í Norðurlandahúsinum og lurtaðu eftir henni, tá hon greiddi frá um bøkurnar hjá sær.

Skuggaportrið er um Onnu, sum sjey ár aftaná, at mamman er horvin hoyrir hana kalla og rópa um hjálp. Men røddin ljóðar bara inni í høvdinum á Onnu, og hon veit ikki, um hon er um at gerast í ørviti, ella um mamman er fangi onkunstaðni og hevur hjálp fyri neyðuni. Allar slóðir leiða til skuggaportrið og beint inn í myrkrið, sum Anna er so bangin fyri.




*Per Olov Enquist:*

## Tey trý hellini

Flestu vaksin kenna rithøvundan frá bókum til vaksna lesaran. Hann dugir sera væl at skriva og hevur fingið nógvar virðislønir. Hetta er ein sonn søga, sum gongur fyri seg í Vermlandi, nær við norska markið, har fýra børn megna at bjarga bæði sær og abba sínum á einum ræðuligum túri til tey trý hellini.



**Frálíkt tilboð til øll, ið hava hug at lesa og menna lesiførleikan.**

# Hoyvíkin veksur




Umhvørvið kring skúlan broytist í stórum.

Tá skúlin varð bygdur í 1977, lá hann so at siga úti í óbygdum. Heiðafuglurin var næsti grannin og stutt var at fara við flokkum niðan á Mylnutjørn ella gjøgnum Dalin Langa, har náttúruumhvørvið við øllum livandi ríkaði sinnið hjá mongum næmingi.

Vanligt var, at næmingar á vári merktu sær fuglareiður, so teir kundu fylgja við, tá brast fyri nev.

Fuglaljóð og jarmandi seyður var ein partur av gerandisdegnum fyri 20/30 árum síðani. Hetta er nú alt broytt.
Í dag eru reiðrini horvin, og fuglurin hevur verið noyddur at velja sær bústað aðrastaðni, tí menniskjan vil hava størri rásarúm.

Har, ið fyrr vóru heyggjar, lagdir, áarløkir, mýrar, heiðalyngur og yðjandi lív, har larma gravimaskinur, ljóða spreingingar og stórir lastbilar flyta túgvur og mosagrót burtur.

Tíðin krevur sítt og soleiðis má vera, siga vit og yppa øksl.

Ein uggi er, at Mylnutjørn kemur at liggja í friði millum nýmótans bygningar og háhús.




**Nýggj útstykking**

Vestan fyri skúlan verður, sum flestum kunnugt, gjørt eitt torg.

Hoyvíkar kirkja stendur á suðursíðuni á hesum torgi og handilsgøtan, Karlamagnusarbreyt, strekkir seg frá torginum og heilt niðan til Húsini á Heiðum, ið eru 10 lonir við 4 ymiskum íbúðarsniðum, ið avmarka býlingin norðureftir.

Beint norðan fyri skúlan, eystan fyri Karlamagnusarbreyt, verða ústykkjað 63 grundøki.

Sum sæst á myndini er stutt millum skúlan og hesi 63 húsini, sum her verða bygd.

Trý fríøki verða gjørd millum húsini og av fríøkjunum verða gøtur til húsini. Til hvørt túnið eru uml. 20 hús.
Byggitíðin er mett at taka eitt ár.

Í næstum verður eisini farið undir at gera nýggja niðankoyring av Vegnum Langa.

Hendan innkoyring verður flutt til vegin eystan fyri Hoyvíkshøllina, og nógv fleiri støðupláss til bilar verða eisini gjørd.
Meiri um hetta í næsta blaði.

# Vit fara ein súkklutúr



*16 reiðmenn á hjólum á veg út í Havnardal*

Í skemafríu vikuni fyri summarfrítíðina var 5.d ein súkklutúr. Næmingarnir møttu í skúla við súkklu og hjálmi.

Haðani varð súkklað yvir á Berjabrekku, yvir á Villingardalsveg og út undir Gráa-stein.

Har fingu vit ein vatnsopa. Síðani gekk leiðin út til ríðibreytina í Havnardali og eftir



*Gott at fáa eina lítla hvíld og ein vatnsopa*



*Ein væluppiborin matarsteðgur. Frá vinstru: Lisa, Hjørdis, Linda og Kristina.*

gøtuni móti Hotel Føroyum. Har fóru vit av gøtuni og ótu matpakkan. Vit runnu kapp niðan á Vestur Varða.

Leiðin gekk síðani niðan á Oyggjarvegin og so heim aftur til skúlan.

Endamálið við túrinum var at læra børnini um ferðslu og vísa, at tað ber til trygt at fara ein súkklutúr í Havn.



*Vinnararnir av kapprenningini vóru Andrias, Jákup og Tóraldur. Tað var lætt at koma upp á varðan, men torførari at koma niðuraftur.*

# Átak móti happing í skúlanum

Í Hoyvíkar skúla verður happing ikki góðtikin. Ein arbeiðsbólkur við lærarum er settur at arbeiða við at basa og fyribyrgja happing og gera átøk til frama fyri trivnaðin. Eisini skal hesin bólkur arbeiða við einum *antihappingarpolitikki* í Hoyvíkar skúla.

Góður trivnaður er ein fortreyt fyri góðari læring. Ein trivnaðarætlan og ein tilbúgvingarætlan skulu orðast, har víst verður á greiðar mannagongdir, tá ið happing fer fram, - hvat skal gerast, tá ið happing er, og hvør hevur ábyrgdina av hvørjum?

Í hesum sambandi fingu vit vitjan av arbeiðsbólkinum á Venjingarskúlanum, sum júst hevur lagt síðstu hond á verkið við síni ætlan. Tey greiddu okkum frá arbeiðsgongdini, og vit fingu vegleiðing og góð ráð um, hvussu arbeitt kann verða við hesum.

# Vitjan av Blindastovninum

1.a, b og d hava eitt tíðarskeið arbeitt við evninum: "Okkara sansir". Í hesum sambandi fingu vit vitjan av Ruth, Mariu og Katrin av blindastovninum . Ruth, sum er blind, hevði førarahund sín "Toka" við. Hon greiddi so hugvekjandi frá, hvussu tað er at vera blind, hvør uppgávan hjá "Toka" er, hvørji hjálpartól eru til blind og somuleiðis góvu tær okkum ráð og vegleiðing, hvussu vit skulu gera, tá ið vit møta og eru saman við einum blindum persóni. - Næmingarnir fingu eisini høvi at seta spurningar.

Sera áhugaverd og lærurík vitjan.



*Maria, Toke og Ruth*



*Øll børnini í fyrstu flokkunum sita fitt og lurta. Fólkini av Blindastovninum hildu, at børnini vóru sera friðarlig. Tey vóru bilsin um, hvussu væl børnini dugdu at lurta.*



*Toke er til arbeiðis. Tá ið hann hevur reimina uppi á, má hann ikki órógvast.*



*Fólk frá sjónvarpinum vóru og tóku upp í sambandi við, at tey gera eina sending um Ruth og Toka. Aftaná var ein kaffimunnur góður.*

# Aftur í gamlar dagar

**2.a og 2.b í Hoyvíkar skúla eru farin aftur í gamlar dagar. Heilt nágreiniliga eini 50 til 100 ár. Tey hava spurt og kannað, prátað og leitað í kjallarum og á ovasta lofti. Evnið er breitt: Gamlir lutir, kríggið og hvussu ferðaðust tey fyrr í tíðini.**

Í 2. a og 2. b arbeiða tey júst nú við evninum: “Ì gomlum døgum”, og farast skal ikki longur enn 100 ár aftur. Tey spyrja og kanna, leita í kjallarum og á ovasta lofti, í gomlum kistum ella heima hjá langommu og langabba. Og nógvir gamlir lutir hava funnið veg inn í Hoyvíkar skúla. Her er eitt vaskibretti, eitt strúkijarn, ein grindaknívur, gomul skrivihefti, ein glansbílætabók, ein telefon, ein sálmabók hjá Thomas Kingo, ein ljósadúkur, skúlabøkur og nógv, nógv annað. So nú verður arbeitt av grimd: Tey skulu skriva og tekna, taka myndir og kjakast.
Tá arbeiðið er liðugt, skulu næmingarnir leggja fram fyri hvørjum øðrum.



*Ymiskir gamlir lutir, m.a. eitt strúkijarn, ein leistur, ein telefon og eitt góðaráðjarn.*




*Gamlar skúlabøkur, glansbíløt og ein gamal passari.*



*Her er m.a. ein gomul sálmabók hjá Thomas Kingo*



*Bergur, Teit og Janus gera eina plansju til framløguna.*

# Næmingar og lærari tekna

## Í handverk og list hava 6. flokkarnir arbeitt við blýantstekning. Pól leggur teimum lag á og ger her viðmerkingar til nakrar av tekningunum



Her er Linda byrjað við stelkinum á blómuni, síðani ger hon krúnubløðini og blaðið. Linjurnar eru eins og bogar. Luftin er gjørd við skravering tvs. skákstrikum. Eisini verður tann negativa flatan skapt við, at tað tóma hvíta pappírið kemur fram sum ljós.



Í hesari myndini hevur Tóraldur hermt eitt sindur eftir Leonardo da Vinci.
Hann gjørdi eina slíka, tá hann var ungur. Roymdi at fáa skuggar fram við nógvum strikum á skák móti hvørji aðrari. Ljósið niður á mann og hest er av stórum týdningi, tí tá trína hesir út úr skugga. Myndin sýnist livandi.



Kenna tit hendan fýrin? Hann hevur alstóran týdning fyri hetta blað.
Hann er eisini kendur fyri at kunna rista eina stuttliga søgu úr ermuni, um tað skal vera.




Aftur eitt dømi um skraveringar.
Skraveringar eru nýttar til at gera skugga, harvið verður tað tóma rúmið, sum ikki er skraverað, lýst upp sum av eini sterkari lampu.



# Lesiløtan

Mánadagin 26. februar fór Hoyvíkar Skúli undir eitt lesitiltak.

Hetta tiltak eitur Lesiløtan, og er ein løta, har allir næmingar skúlans sita og lesa í senn í 15 min.
Hetta verður sjálvandi gjørt fyri at menna lesiførleikan og stimbra lestrarhugin hjá børnunum, tí sum vit øll vita, so er neyðugt at duga væl at lesa fyri at kunna vera til í nútíðarsamfelagnum.

Hetta verður fyrst gjørt sum ein roynd, og tá 5 vikur eru farnar, fara vit at eftirmeta og vita, um vit skulu halda fram til summarfrítíðina. Verður úrslitið jaligt, er møguleiki fyri at leggja Lesiløtuna inn í tímatalvuna til komandi skúlaár.

Nú er ein vika farin, og vit kunna fegnast um at siga tykkum foreldrum og avvarðandi frá, at børnini hava tikið sera væl ímóti Lesiløtuni.

Tey spyrja, nær kl. verður 9:10, so tey kunna sleppa at lesa. Fleiri vilja sleppa at halda fram at lesa, tá Lesiløtan er ringd av, og tey hava lisið nógv hesa vikuna.

Tað gleðir okkum almikið, at foreldrini eisini taka undir við hesum og sita heima og lesa við børnunum um kvøldið. Vit vóna, at tit kæru foreldur fara at hjálpa okkum at halda fast um tiltakið og dagliga eggja børnum tykkara til eisini at lesa heima eina løtu hvønn einasta dag.

Tað er ein stór uppliving at ganga í gjøgnum skúlahallirnar, meðan Lesiløtan er.
Hurðarnar inn í allar skúlastovurnar standa opnar á víðan vegg, øll sita fitt og still inni í stovunum og lesa, ikki eitt kis hoyrist nakrastaðni.
Kanska kann Lesiløtan hjálpa børnunum at fata, hvussu neyðugt tað er við friði, tá tey skulu samla seg um eitt hvørt arbeiði.

Vit meta, at tað er sera gevandi, at vit í dagliga meldrinum geva okkum stundir at steðga á eina løtu og vera saman um okkurt, sum er nyttugt fyri okkum - lesnaðin, friðin og hugsavnanina.

Tá løtan er ringd av, hava børnini eina lítla løtu til at skriva niður, hvussu nógv tey hava lisið, og tá kunna tey eisini skriva eitt stutt ummæli av bókunum.
Børnini hava fingið hvør sína mappu, har tey kunna samla øll ummælini í, og tá hesar 5 vikurnar eru farnar, ber til hjá teimum og tykkum at síggja úrslitið av hesum 5 vikunum.

Við lestrarkvøðu
Bókavørðirnir

# Grýlur






















# Føroyski dansurin

Í dansitíðini nú í tveir vetrar hava vit fingið serliga góða hjálp frá dansifólki uttan í frá at hjálpa okkum at skipa tann føroyska dansin.

Sum nakað nýtt hava teir eldru flokkarnir frá 4. til 7. hvør sær verið í Hornahúsunum, har dansurin er betur komin til sín rætt í hugnaliga umhvørvinum har.
Tað skulu góðir dansarar til at skipa dansin, tá einir 450 næmingar skulu upp á gólv í senn.

Í ár vóru tað hesir tríggir: Erlendur Simonsen, Símun Hansen og Jón Durhuus, sum hjálptu skúlanum við hesum tiltaki. Dagurin endaði við at øll, næmingar og starvsfólk, eftir tunnuslóttin, slóðu ring og taldu jólini













**Í Hoyvíkar Skúla samstarva heim og skúli**

**Vit møta stundisliga og fyrireikað**

**Vit virða hvør annan**
**og ganga væl um skúlan og umhvørvið**

**Vit eru íðin, høvisk og fyrikomandi**

**Vit læra hvønn dag**

**Inni er altíð arbeiðsfriður**



http://www.skulin.fo/hoy